Ár 2009, hin 24. mars

18.
09/00207 Farloyvi frá býráðsarbeiðnum.

Í skrivi dagfest, 13. mars 09 søkir Hans Arne Bertholdsen, býráðslimur um farloyvi frá býráðsarbeiðnum í tíðarskeiðinum 31.03.09 til 30.06.09, og at varamaður hansara tekur sætið í býráðnum í hansara stað.

Býráðsins samtykt: Samtykt

19.
09/00150 Val av valstýri fyri atkvøðuøkið Svínoy.

Nú Klaksvíkar og Svínoyar kommunur hava lagt saman, er tað uppgávan hjá Klaksvíkar Býráð at velja hetta valstýrið fyri atkvøðuøkið Svínoy. Sum útgangsstøði verður mælt til at velja niðanfyri nevndu persónar í stýrið – hetta so fólk við kunnleika og royndum innan økið framhaldandi manna stýrið.

Limir:
Regin Justinussen
Hanna Jacobsen
Petur Danielsen

Varalimir:
Fróði Thomassen
Óli á Geilini

Býráðsins samtykt: Tilmælið samtykt

20.
09/00034 Havnanevndin broytast til Havna- og Vinnunevndin.

Vísandi til samtyktina í Havnanevnd býráðsins 13.01.09, verður mælt til broyting í kommunustýrisskipan kommununnar. Sí skriv frá umsitingini, dagf. 06.03.09.

Havnanevndin tekur undir við skrivi frá umsitingini, dagf. 06.03.09 við tí broyting av orðingini í grein 28, 3. petti, at nevndin fyrisitur vinnuøkið.

Fíggjarnevndin tekur undir við Havnanevndini 10.03.09.

Býráðsins samtykt: Tilmælið samtykt

21.
09/00061 Staðbundin nevnd fyri Norðoyri.

Málið um staðbundna nevnd fyri Norðoyri hevur verið frammi í fleiri ár. Hjálagt er Undirskjal 1, sum í stuttum lýsir gongdina í málinum, sum til dags dato er endað við, at kommunan valdi ikki at skipa fyri vali av Norðoyranevnd í sambandi við býráðs-valið í nov. 2008. Sí skriv frá umsitingini, dagf. 05.03.09.

Byggi- og býarskipanarnevndin er jalig viðv. spurninginum um Oyranevnd, sum byrjar at arbeiða í komandi ári.

Heilsu- og umhvørvisnevndin er samd um, at Norðoyri skal hava eina staðbundna nevnd, og mælt verður til, at tað verður sett í gildi í 2010.

Havnanevndin tekur undir við tilmæli frá umsitingini, dagf. 05.03.09.

Tekniska nevnd tekur undir við skrivi frá umsitingini, dagf. 05.03.09, og mælir til, at bygnaðurin sum heild verður endur-skoðaður.

Sosiala nevnd tekur undir við tilmælinum frá umsitingini, dagf. 05.03.09, men mælir til, at tað verður sett í gildi í 2010.

Mentanarnevndin tekur undir við, at staðbundin nevnd verður skipað, men mælir tó til, at hetta verður sett í gildi í 2010.

Fíggjarnevndin tekur undir við Byggi- og býarskipanarnevndini 09.03.09, Heilsu- og umhvørvisnevndini 09.03.09, Havnanevnd-ini 10.03.09, Teknisku nevnd 10.03.09, Sosialu nevnd 11.03.09 og Mentanarnevndini 11.03.09.

Býráðsins samtykt: Tilmælið samtykt

22.
09/00164 Endurskoðan og framhald av byggi- og býar-skipanararbeiði kommununnar.

Sí frágreiðing um arbeiðsfund frá T.U., dagf. 26. febr. 2009.

Tekniska nevnd tekur undir við, at T.U. arbeiðir við byggi- og býarskipanararbeiðnum og mælir til, at arbeiðssetningurin verður tikin uppaftur á næsta fundi. Avrit av málinum latið nevndarlimunum.

Málið hevur verið til kunning í Sosialu nevnd.

Málið hevur verið til kunning í Mentanarnevndini.

Fíggjarnevndin tekur undir við Teknisku nevnd 10.03.09 og minnir samstundis á, at játtanin til útreiðslurnar skal haldast.

Býráðsins samtykt: Málið verið til kunning í Byggi- og Býarskipanarnevndini 09.09.09, í Heilsunevndini 09.03.09 og í Havnanevndini 10.03.09. Tilmælið samtykt.

23.
09/00122 Reglugerð fyri fráboðan og avgreiðslu av nevndarfundum býráðsins.

Hjálagt er uppskot til reglugerð, sum mælt verður nevndum og býráði til at samtykkja sum undirskjal til fundarskipan býráðsins

Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við reglugerðini, men mælir til, at ein rímilig freist verður ásett nær málini til nevndarfund í seinasta lagi skulu verða innkomin. Viðv. grein 5 er nevndin av tí áskoðan, at nevndarformaðurin framvegis einsamallur hevur heimild til at útseta og kalla inn til fundar.

Heilsu- og umhvørvisnevndin tekur undir við byggi- og býar-skipanarnevndini 09.03.09.

Havnanevndin tekur undir við byggi- og býarskipanarnevndini 09.03.09.

Ferðslunevndin tekur undir við byggi- og býarskipanarnevndini 09.03.09.

Tekniska nevnd tekur undir við byggi- og býarskipanarnevndini 09.03.09.

Sosiala nevnd tekur undir við reglugerðini, tó mælir nevndin til at broyta orðingina í grein 7 "....avgreiða málið í samráð við borgarstjóran" til "....kann kunna borgarstjóran". Somuleiðis samtykti nevndin at áseta í reglugerðini um freistir til nær mál skulu latast umsitingini.

Mentanarnevndin tekur undir við Byggi- og býarskipanarnevnd-ini 09.03.09.

Fíggjarnevndin tekur undir við Byggi- og býarskipanarnevndini 09.03.09, Heilsu- og umhvørvisnevndini 09.03.09, Havnanevnd-ini 10.03.09, Ferðslunevndini 10.03.09, Teknisku nevnd 10.03.09, Sosialu nevnd 11.03.09 og Mentanarnevndini 11.03.09.

Býráðsins samtykt: Málið beint aftur í umsitingina

24.
2007-19-135 Mannagongd fyri kommunalar byggi- verkætlanir.

Tann 27. november 2007 sett býráðið nýggjar leiðreglur fyri kommunalu arbeiðini í gildi, og samtykti samstundis, at reglu-gerðin skuldi endurskoðast innan eitt ár var umliðið. Uppskot til mannagongdir og fundarskipan er viðløgd sum bilag A og B.

Havnanevndin tekur undir við tilmæli frá T.U., dagf. 06.03.09.

Tekniska nevnd tekur undir við tilmæli frá T.U., dagf. 06.03.09

Sosiala nevnd tekur undir við tilmæli frá T.U., dagf. 06.03.09

Mentanarnevndin tekur undir við tilmæli frá T.U., dagf. 06.03.09

Fíggjarnevndin tekur undir við Teknisku nevnd 10.03.09, Sosialu nevnd 11.03.09, Mentanarnevndini 11.03.09.

Býráðsins samtykt: Tilmælið samtykt

25.
2007-03-094 Loyvi til at gera rampu frá omankoyringini til Dávavirkið og oman til húsið.

Sambært avtalu við formannin í Havnanevndini verður málið lagt fyri nevndina av nýggjum.

Havnanevndin mælir til, at loyvið verður givið til brúnna so leingi, sum kommunan leigar Dávavirkið.

Býráðsins samtykt: Tilmælið samtykt

26.
09/00033 Umskipan av líkvognatænastuni.

Víst verður til skriv, dagf. 06.02.09 frá umsitingini, sum varð viðgjørt av TN, MeN og FíN. Sí lýsing av málinum og tilmæli frá umsitingini, dagf. 04.03.09 í 3. Pkt.

Ein meiriluti í Teknisku nevnd, Óli M. Lassen, Óluva Klettskarð
Hans Arne Bertholdsen og Elsebeth G. Hansen, tekur undir við tilmæli frá T.U., dagf. 04.03.09.
Ein minniluti, Jógvan Skorheim, mælir til, at tænastan verður boðin út, har kommunan tó ber kostnaðin.

Sosiala nevnd tekur undir við tilmæli frá umsitingini, dagf. 04.03.09, (tað innrammaða). Nevndin er samd um, at tað fram-haldandi skal vera kommunan, sum tekur sær av líkvogna-tænastuni.

Ein meiriluti í Mentanarnevndini, Atli S. Justinussen, Elsebeth G. Hansen og Jákup N. Mikkelsen, tekur undir við Sosialu nevnd 11.03.09.
Ein minniluti, Óluva Klettskarð, tekur undir við tilmæli 04.03.09 Pkt. 3.
Ein annar minniluti, Jógvan Skorheim, mælir til, at tænastan verður boðin út, har kommunan tó ber kostnaðin.

Ein meiriluti í Fíggjarnevndini, Gunvá við Keldu, Steinbjørn O. Jacobsen og Auðunn Konráðsson, tekur undir við meirilutanum í Teknisku nevnd 10.03.09, Sosialu nevnd 11.03.09 og í Ment-anarnevndini 11.03.09.
Ein minniluti, Jógvan Skorheim, tekur undir við minnilutanum í Teknisku nevnd 10.03.09.

Býráðsins samtykt: Tilmælið frá minnilutanum í Teknisku nevnd, Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini fall við 1 atkvøðu fyri (Jógvan Skorheim) og 9 ímóti. Atli S. Justinussen atkvøddi ikki.
Tilmælið frá meirilutanum í Teknisku nevnd, frá Sosialu nevnd, frá meirilutanum í Mentanarnevndini og meirilutanum í Fíggjarnevndini varð samtykt við 10 atkvøðum fyri og 1 ímóti (Jógvan Skorheim).

27.
2008-03-079 Fyrispurningur um ídnaðarøki á Strond.

Munnligur fyrispurningur er komin til kommununa fyri at kanna eftir, um tað ber til at finna eitt øki í Klaksvík, har niðurtikna høllin við Borðoyavík kann setast uppaftur. Vísandi til málið um ídnaðarøki á Strond hevur umsitingin nevnt møguleikan at rudda fyri og byggibúgva eitt øki í grótbrotinum á Strond sambært við-løgdu ætlan, sí skriv frá T.U., dagf. 06.03.09.

Tekniska nevnd tekur undir við málinum treytað av, at hetta er trygdarliga í lagi.

Fíggjarnevndin tekur undir Teknisku nevnd 10.03.09.

Býráðsins samtykt: Tilmælið samtykt

28.
2002-03-114 Føroya Keypssamtøka – byggifreist og keypsprísur.

Á fundi 27.02.09 gjørdi Føroya Keypssamtøka vart við, at teir eru ónøgdir við, at byggifreistin var ásett til ½ ár. Teir vístu á, at aðrastaðni var kravið 2 ár og ynsktu teir tað sama fyri teirra bygging. Spurningurin um at leingja byggifreistina verður við hesum lagt fyri til støðutakan. Spurningurin um leigu ella sølu verður eisini lagdur fram til

støðutakan, men T.U. heldur annars fast við tilmæli frá 05.09.08 um ein søluprís uppá kr. 1.500,-m2.

Tekniska nevnd tekur undir við tilmælinum frá T.U.06.03.09 við byggifreist uppá 2 ár og 1.500,- kr./m2. Nevndin mælir til fund við Føroya Keypssamtøku um málið.

Fíggjarnevndin tekur undir við Teknisku nevnd 10.03.09 og at byggifreistin uppá 2 ár verður roknað frá tí, at tilsøgnin um økið varð givin Føroya Keypssamtøku í skrivi, dagf. 30.09.08, leing-ingin av byggifreistini er treytað av, at grundøkið verður goldið kommununi innan eitt ½ ár frá hesi samtykt.

Býráðsins samtykt: Tilmælið frá Fíggjarnevndini samtykt. Atli S. Justinussen luttók ikki vegna ógegni

29.
2007-03 Bygging av hestahúsi á Norðoyri – matr. 8c.

Í fleiri ár hevur eigari havt eitt hestahús omanfyri vegin á Skarðhamri á stykkinum hjá Jákup Gerðalíð. Vegna bygging, sum Jákup framdi her, byrjaði eigarin av hestahúsinum bygging av einum minni húsi niðanfyri vegin, men bleiv steðgaður.
Samráðingar hava verið millum eigaran og Norðoya Rossafelag um møguleikan fyri at byggja eitt minni hús á øki teirra á Norðoyri matr. 8c har teir hava fingið byggiloyvi fyri eini størri bygging. Ognin liggur í landbúnaðarøki, so her kunnu verða bygd fjós o.t. ætlað til endamálið so sum Norðoya Rossafelag eisini hevur fingið byggiloyvi til. Norðoya Rossafelag hevur keypt ognina fyri kr. 200.000,-. Í sambandi við, at byggiloyvi varð játtað fingu teir goldið frá kommununi kr. 100.000,-. Kommunan hevur ikki viljað goldið meir, fyrrenn byggingin var væl áleiðis, ella í besta føri liðug. Býráðið samtykti 29.04.08 at gjalda kr. 100.000,- móti at fáa ognarættin á stykkinum, har Býráðið tryggjar Norðoya Rossafelag leigurættin til økið. Vegna vánaliga fíggjarstøðu vórðu pengarnir ikki goldnir. Norðoya Rossafelag er nú umvegis sakførara vegna Norðoya Sparikassa kravt eftir peninginum.
Sí frágreiðing og tilmæli frá mentanardeildarleiðaranum Pkt. 1 – 8.

Tekniska nevnd tekur undir við tilmælinum frá mentanardeildar-leiðaranum, dagf. 05.03.09.

Menanarnevndin tekur undir við tilmæli 05.03.09 – Pkt. 6 og 7.

Fíggjarnevndin tekur undir við Teknisku nevnd 10.03.09 og Mentanarnevndini 11.03.09.

Býráðsins samtykt: Tilmælið samtykt